

# Spakin settur í fyri nýggjum skúla í Runavík

*Soleiðis fer nýggi skúlabygningurin í Runavík at síggja út. Skúlabygningurin verður 4.800 m2 til víddar. Samlaði kostnaðurin verður 82 milliónir krónur.*

SKÚLABYGGING

*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Í dag kl. 15.00 varð spakin settur í til stóru skúlaverkætlanina í Runavík.

Tað er Articon sum í kapping millum tríggjar byggifyritøkur hevur fingið arbeiðið at byggja nýggjan skúla í Runavík.

Skúlabygningurin, sum verður 4.800 m2 til víddar, hevur 18 skúlastovur umframt serstovur og aulu. Samlaði kostnaðurin fyri skúlan er slakar 82 mió. kr.

Fyrsti parturin av skúlanum, sum umfatar skúlastovurnar, skal standa liðugur um eitt ár. Tá verður gamli skúlin niðurtikin og næmingarnir flyta inn í nýggju skúlastovurnar. Samlaða byggiætlanin skal verða liðug við ársenda 2008.

*Kelda: www.runavik.fo*

# Tutl gevur danska trubadur fløgu út




**Plátufelagið Tutl gevur í næstum út fløguna Ind Under Frakken hjá Bornholmaranum Mikkel Thomas. Tónleikurin er sera danskur, men hevur fleiri føroysk fingramerki**

TÓNLEIKUR

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Mikkel Thomas býr nú á Bornholm og bróðurparturin av tónleikarunum er ugarvaðir bornholmskir tónleikarar. Men gittarleikarin er vestmenninginum Janus Kampmann, eisini spælir Stamen Stanchev ljómborð. Í Føroyum hava hesir tríggir fleiri ferðir spælt undir navninum Natlys, ein bólkur sum eisini hevur havt føroyska Rógva Borðoy sum bassleikara. Mikkel Thomas sjálvur hevur áður búð í Føroyum, har hann í hálvt annað ár arbeiddi sum bátabyggjari í Miðvági.

Fríggjakvøldið spældu Janus, Mikkel og bornholmsku tónleikararnir í TV2 Bornholm. Fyrsta fløgan hjá Mikkel Thomas er ein trubadur fløga, sungin á donskum. Tey bæði løgini, ið bólkurin framførdi í TV2 Bornholm kunnu ivaleyst bólkast sum danskur poppur við grund í blúskendum popprokki. Tittullagið Ind Under Frakken kundi, uttan at nakar hevði mótmælt, verið á Still Got The Blues fløguni hjá Gary Moore.

Fløgan verður alment givin út 12. oktober, men longu í gjár var útgávukonsert í Rønne á Bornholm kl. 15 í Rasch Pakhus. Á hesi konsertini bar til at ogna sær fløguna. Hygg at klippinum á TV2 Bornholm her: www.tv2bornholm.dk/moduler/nyheder/showregvideo.asp?dato=29-09-2006&cID=1&vId=310297

**MRCC- Tórshavn**
E-mail: mrcc@mrcc.fo * www.mrcc.fo
Tlf: +298-351302 * Fax: +298-351301
Inmarsat C: 492 888 021 * Inmarsat B: 323 116220 (voice) 323 116221 (Fax)

**Fráboðan um seismikkvirksemi**

Lýst verður at seismiskar kanningar verða gjørdar á hesum linjum:

Linja 1.: 61°19,5N 005°04,3V - 61°06,8N 004°00,3V
Linja 2.: 61°13,5N 004°09,2V - 60°16,7N 004°59,9V

**Felagið WesternGeco Ltd. kannar økið.**

| | |
|---|---|
| Byrja verður: | 02.10.2006 |
| Arbeiðið tekur væntandi: | 6 vikur |
| Skipanavn: | Western Regent |
| Kallibókstavar: | 3ELY9 |
| Heimstaður: | Panama |
| Fiskiveiðiumboð: | Jørgin Joensen |

**Samband fæst við skipið á VHF rás 16.**

Upplýsingar um arbeiðið fáast frá Tórshavn Radio, á heimasíðuni hjá sjóbjargingarstøðini, www.mrcc.fo, ella á telefon 351302.

**Til sølu**

Tvey hús á Tvøroyri til sølu.

**Tlf. 0045 31257797**

*Gravarhjálp*
*Marknagilsvegur 86 · 100 Tórshavn*
*Tel 311723 - 511723 · Fax 321722*
*herman@post.olivant.fo*

**Vit útinna allar uppgávur í sambandi við eina jarðarferð frá byrjan til enda**

- Eisini sangir, blómur og kransar
- Vit syrgja fyri sangarum *(í Tórshavn)*
- Vit framleiða okkara egnu kistur *(veita um alt landið)*
- Skipa fyri líkflutningi til og úr Føroyum
- Skipa fyri líkbrenning
- Hjá okkum kanst tú bestemma **tín síðsta vilja**

Sosialurin 341800